# Kjansurin hjá SÍ

**Hjá monnunum skal SÍ nú prógva, at teir eiga at teljast við í oddinum, og hjá kvinnunum skal Dráttur enn einaferð royna at kløkka Mjølnir**

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 06.12 | 14.30 | Neistin-Stjørnan |
| 07.12 | 14.30 | Kyndil-VÍF |
| 07.12 | 14.30 | StÍF-VB |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 07.12 | 16.00 | StÍF-H71 |
| 07.12 | 16.00 | Kyndil-VÍF |
| 07.12 | 16.00 | KÍF-Neistin |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 06.12 | 14.00 | Dráttur-Mjølnir |
| 06.12 | 14.00 | Fleyr-KÍF |
| 07.12 | 15.00 | TB-ÍF |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 06.12 | 16.00 | SÍ-Mjølnir |
| 06.12 | 16.00 | Fleyr-Fram |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 9 | 7 - 0 - 2 | 223 | 159 | 64 | 14 |
| 2 | Stjørnan | 8 | 6 - 1 - 1 | 194 | 148 | 46 | 13 |
| 3 | VÍF | 9 | 5 - 1 - 3 | 211 | 198 | 13 | 11 |
| 4 | Neistin | 8 | 4 - 1 - 3 | 211 | 186 | 25 | 9 |
| 5 | StÍF | 8 | 4 - 1 - 3 | 194 | 187 | 7 | 9 |
| 6 | Søljan | 9 | 1 - 0 - 8 | 153 | 214 | -61 | 2 |
| 7 | Kyndil | 9 | 1 - 0 - 8 | 142 | 236 | -94 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 7 | 5 - 1 - 1 | 211 | 194 | 17 | 11 |
| 2 | Neistin | 7 | 4 - 2 - 1 | 199 | 174 | 25 | 10 |
| 3 | StÍF | 7 | 4 - 0 - 3 | 174 | 172 | 2 | 8 |
| 4 | VÍF | 7 | 3 - 1 - 3 | 184 | 170 | 14 | 7 |
| 5 | H71 | 7 | 1 - 1 - 5 | 167 | 184 | -17 | 3 |
| 6 | KÍF | 7 | 1 - 1 - 5 | 166 | 207 | -41 | 3 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 8 | 6 - 2 | 21 | 6 | 15 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 6 - 2 | 19 | 9 | 10 | 12 |
| 3 | Dráttur | 8 | 4 - 4 | 17 | 15 | 2 | 8 |
| 4 | KÍF | 8 | 4 - 4 | 14 | 17 | -3 | 8 |
| 5 | ÍF | 8 | 3 - 5 | 10 | 16 | -6 | 6 |
| 6 | Fleyr | 8 | 1 - 7 | 5 | 23 | -18 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 7 | 6 - 1 | 18 | 5 | 13 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 6 | 5 - 1 | 15 | 3 | 12 | 10 |
| 3 | SÍ | 7 | 4 - 3 | 14 | 11 | 3 | 8 |
| 4 | Fram | 6 | 1 - 5 | 5 | 16 | -11 | 2 |
| 5 | Fleyr | 6 | 0 - 6 | 1 | 18 | -17 | 0 |

FLOGBÓLTUR
*upptakt*



*Sørvingar kunnu leggja seg heilt fram í oddin, um teimum eydnast at basa Mjølnir, men tað krevur sum minimum, at SÍ hevur ein heilt góðan dag*

Tveir dystir verða sum vant í meistaradeildini hjá monnum. Hesa ferð eru tað fuglfirðingarnir, sum sita yvir, og tað kann hava við sær, at oddurin fer at treingjast.

Dysturin í Sørvági leygardagin millum SÍ og Mjølnir er altavgerandi fyri SÍ, um teir skulu gerast føroyameistarar í ár. Tapir SÍ, so koma teir at standa á 4 stigum, tá stigini verða hálverað um eina viku, og tað verða so 3 stig minni enn bæði Mjølnir og ÍF hava, um vit tora at vera so frek at gita, at hesi bæði seinnu vinna sín seinasta dyst í innleiðandi umfarinum, sum eru ímóti ávikavist Fleyr og Fram.

Men vinnur SÍ harafturímóti, so verður bara eitt stig upp til Mjølnir og tvey til ÍF, og so er einki avgjørt.

Men skal SÍ vinna, so skulu teir spæla upp til sítt allarbesta og hava góða hjálp frá trúgvu áskoðarunum í Sørvági, tí Mjølnir er sera sterkt

Fleyr hevur í longri tíð havt eina strævna tilveru í meistaradeildini. Teir hava ikki vunnið ein dyst síðani 9/2-2002, og spurningurin er, um teir vinna nakran í ár heldur. Men skal tað verða, so skal tað helst verða móti Fram, sum bert hevur vunnið ein dyst hetta kappingarárið. Tað var eisini í fyrra dystinum teirra millum, at Fleyr vann sítt fyrsta, og higartil einasta sett hetta kappingarárið.

### Einki er vist

Hjá kvinnunum sleppa hinvegin øll liðini í part. Á pappírinum tykist mest spennandi uppgerðin vera tann millum Dráttur og Mjølnir, men heldur ikki í hinum báðum dystunum kann nakað úrslit tó takast fyri givið.

Í triðja umfarinum í ár tók Dráttur tey flogbóltskønu á bóli, tá tær í Klaksvík vunnu á Mjølni. Undan tí dystinum hevði Mjølnir bara vunnið, og Dráttur bara tapt, men tann dagin var alt vent á høvdið.

Men Mjølnir hevur kortini fótað sær aftur síðani tá, og er aftur hesaferð favorittur at vinna á Drátti. Men kvinnukappingin hevur verið púra óútroknilig í ár, so hvør veit...?

Kvinnuliðið hjá Fleyr hevur tað líka torført sum mansliðið hjá felagnum og langt er ímillum sigrarnar. Men hjá kvinnunum er støðan tó álvarsligari, enn hon er hjá monnunum, tí liðið kann flyta niður í 1. deild.

Spurningurin er so, um Fleyr kann gera sær dælt av ringu gongdini hjá KÍF seinastu dystirnar. KÍF hevur tapt 4 dystir upp í slag, men nú ætla tær óivað, at tann óvanin skal halda uppat.

Mikudagin vann ÍF 3-1 á Drátti, sum fyrr í ár hevur vunnið á Mjølni, sum fyrr í ár hevur vunnið á TB, og tískil átti ÍF at vunnið á TB sunnudagin. Men hatta er kortini Erasmus Montanus logikkur, tí ilt er at síggja, at ÍF fer at hótta oddaliðið TB.

# Landsliðið til EM-undankappingina

**17 leikarar eru fyribils úttiknir til manslandsliðið í flogbólti, sum í næstum fer til Skotlands at spæla**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan er her um eina fýralandakapping, sum samstundis er undankapping til EM. Til samans eru tað átta lið, sum kappast um pláss í B-bólkinum til EM.

Í bólkinum, sum Føroyar eru í, eru eisini Skotland, Ísland, og Luxemburg. Hin bólkurin er settur saman av Kypros, Andorra, Írlandi og Norðurírlandi.

Tvey lið úr hvørjum bólki koma víðari til endaumfarið í undankappingini, og er føroyski hópurin hesin. Rúni Weihe úr BK Tromsø. Bárður B. Mikkelsen og Ragnar í Haraldsstovu Petersen úr Holte IF. Steinar H. Eirikstoft og Suni Juul Pedersen úr P.V.C. Lyngby. Johan Nielsen úr Amager VK. Heiðrikkur Bergsson, Jens Heri Bolstad Mortensen og Heini Weihe úr Fram. Odd Eliasen, Bartal Eliasen, Kenneth Neshamar og Jan Áki Olsen úr ÍF. Andrass Jógvansson úr Fleyr. Thorvald Danielsen og Eyðstein Eyðunsson Elttør úr Mjølnir og Jóhan Petur á Stongum úr SÍ.




*Føroyska mansliðið fer úr Føroyum 18. desember og verður heima aftur 22. desember.*




Sethús Norður í Bø, í Fuglafirði til sølu.



Grundøkið er 600 fermetrar. Á loftinum eru: 2 kømur, goymslurúm og altan . Á miðhæddini, sum er 86 fermetrar eru: 2 gangir, køkur, spísikrókur, stova, kamar, baðirúm, wc. Í kjallaranum: 2 rúm, fýrrúm/ vaskirúm og wc. Fastbygdur hjallur 26 fermetrar við kjallara. Húsini eru innrættaði av nýggjum í 1968. Takið er skift í 1988, og nýggj plastvindeygu í 2002. Uttanum húsini er urtagarður við ribs-og sólberjarunnum, rabarbum o. ø. Betonggarður er partvís rundanum grundøkið. Húsini standa mitt í bygdini í friðarligum umhvørvi.
Byggiár: 1940

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Tlf. 447766, 448477 og 282877

KPMG

**Skrivstovufólk**

Fyri miðalstóra byggifyritøku í Tórshavn verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja skjótast gjørligt.

**Starvið**
Starvið er eitt fulltíðarstarv við møguleika fyri niðursettari tíð og fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, harundir bókhaldsarbeiði. Bókhaldsskipanin Navision Financials verður nýtt. Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv í einum mennandi umhvørvi.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til skrivstovuarbeiði og bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars vera fyrikomandi og fryntligur. Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Financials er ein fyrimunur.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 19. desember 2003.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og allar umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

*KPMG statsaut. revisorar Sp/f, sum er føroysk ogn burturav, hevur 26 starvsfólk, er limur í KPMG International, eitt av heimsins størstu samtøkum av grannskoðarafyritøkum við meira enn 100.000 starvsfólkum til samans.*

*KPMG veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, fíggjarstýring, skatt og mvg, og aðrar serligar tænastur á hægsta góðskustigi.*

team85

KPMG statsaut. revisorar Sp/f, www.kpmg.fo, kpmg@kpmg.fo
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35

Hyundai Sonata 2.0 bensin



prísur 177.500,-

· Myrkagráur
· Árgang 2002
· Km. 32.000
· El-rútar
· Klimaanlegg v.m.
· Hita í setrunum
· Sera vælhildin

Sosialurin 341800

Ford Mondeo 1.8 TD Stationcar



prísur 135.000,-

· Árgang des 1998
· Km. 130.000
· Krók · Tokulyktir
· El-rútar
· Klimaanlegg
· CD spælara við 6 fløgum
· Hiti í forrútinum
· Hiti í forsetrum · 4 nýggj heilársdekk á felgum og summardekk á sportfelgum fylgja við · Vælhildin

Rexton RX290 4x4 nýggjur



· Mercedes motorur
· 2.9 litur
· Aircondition
· El-rútar v.m.

Vørubilur, prísir úr 238.648,- v/mvg
Persónbilur, prísir úr 311.190,- v/mvg

Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler



prísur 158.000,-

· Gráur metalllakk
· Árgang 1999
· Km. 95.000
· 5 setur · Aircondition
· Altimetur · El-spegl
· El-rútar framman
· Hita í setrum
· Tokulyktir
· Lættmetalfelgur við heilársdekkum
· Summardekk fylgja við
· Vælhildin

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

LEIKALØTAN Á DRAMAVERKSTAÐNUM
- fyri børn og vaksin

Í brekkuni niðan til ítróttarhøllina á Nabb
*(grønu høllina)*.
Atgongumerkir kunnu keypast í forsølu
í Kunningarstovuni, og á Dramaverkstaðnum
1 tíma undan sýning.

**Kostnaður kr. 40,- fyri børn.**

Vaksin í fylgi við børnum og børn undir 2 ár, ókeypis

Pláss er bert fyri 40 áskoðarum í senn.

Børn undir 5 ár skulu vera saman við vaksnum.

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 8. desember | kl. 16.00 |
| Týsdag | 9. desember | kl. 17.30 |
| Mikudag | 10. desember | kl. 17.30 |
| Hósdag | 11. desember | kl. 17.30 |
| Fríggjadag | 12. desember | kl. 17.30 |
| Leygardag | 13. desember | kl. 17.30 |
| Sunnudag | 14. desember | kl. 17.30 |

DRAMAVERKSTAÐIÐ

Sølufólk




Vit sóknast eftir einum dugnaligum sølufólki m/k at takast við søluna av føroya besta sodavatni.

Søluroyndir er ein fyrimunur.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

Restorffs
Postsmoga 351 · FO-110 Tórshavn
Tel 314728 · restorff@post.olivant.fo

Sosialurin 341800

Jólaveitsla

Pensionistafelagið í Havn hevur jólaveitslu fyri limum á Hotel Hafnia mikukvøldið 17. desember kl. 18.00.
Seinasta freist at tekna seg er á fundinum mikukvøldið 10. desember, ella hjá formanninum, tlf. 315736. Kostnaður fyri hvønn 200 kr.

**Pensionistafelagið í Havn**

Peugeot 306, HDI



- Árgangur: oktobur 1999.
- Koyrt: 68.000 km
- Motorur: TurboDiesel, 2 litur HDI
- Litur: myrkagrønt metallakk

**Annað:** Spildurnýggja kamreim. Eyka alufelgur umframt vanligu felgurnar. Tokulyktir framman og aftan. Eyka bakspoilara. El spegl v. varma. El rútar framman. Varma í forsetrum. Regnsensor í viskara. Verið til øll krøvd eftirlit. Bíligur í rakstri.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Meira fæst at vita á **telefon 551503**

Sosialurin 341800